# Sambýlið Niðaragøta – Samandráttur frá eftirlitinum

Sambýlið Niðaragøta er eitt sambýlið hjá Almannaverkinum, ætlað til vaksin fólk við seinheilaskaða. Í sambýlinum búgva 4 fólk, ið hava hvør sína íbúð, umframt atgongd til felags køk, stovu og vaskirúm.

**Trivnaður og menning hjá húsfólkunum**
Eftirlitið vísir, at húsfólkini í Sambýlinum Niðaragøta trívast væl og eru trygg. Tey hava jalig sambond við onnur og hava ein innihaldsríkan gerandisdag. Sosialir felagsskapir eru til húsfólkini, og frítíðarvirksemi og gott samskifti við starvsfólk, er ein natúrligur partur av lívinum. Sambandi millum starvsfólk og húsfólk er nærverandi, og tey laga seg til hvørt annað. Húsfólkini fáa stuðul til at hava samband við familju og at luttaka í virksemi uttanfyri húsið, um tey ynskja tað og hava førleika til tað. Eftirlitið staðfestir, at støðið í trivnaðinum og menningini er gott, og at grundarlagið fyri persónligum tryggleika og felagsskapi er gott.

**Fakliga støðið hjá starvsfólkunum**
Starvsfólkini vísa góðan fakligan førleika og hava drúgvar arbeiðsroyndir við fólkum við seinheilaskaða. Tey arbeiða miðvíst við viðurkennandi tilgongd, og hava øll fingið KRAP-skeið, umframt at tey regluliga fáa supervisjón. Arbeiðsumhvørvið er støðugt, og starvsfólk trívast væl í síni arbeiðsuppgávu. Eftirlitið vísir, at starvsfólkini hava eitt jaligt, virðiligt og fakliga grundað samstarv við húsfólkini, og at tey leggja stóran dent á, at laga daglig tiltøk og stuðul eftir tørvinum hjá tí einstaka.

**Ætlan og virkisætlan**
Eftirlitið vísir, at tilboðið arbeiðir við virkisætlanum, sum verða eftirmettar og dagførdar regluliga. Virkisætlanirnar geva eina greiða mynd av heildarmenningini av málum, førleikum og tørvi hjá einstaka húsfólkinum, og verða brúktar sum grundarlag fyri dagliga arbeiðinum. Starvsfólk arbeiða við at tryggja, at málini eru hóskandi og meiningsfull, so húsfólkið fær rætta stuðulin í trivnaði og viðlíkahald av førleikum. Heildarmyndin er, at tilboðið livir væl upp til krøvini um at arbeiða eftir ætlan og virkisætlan.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Sambýlið arbeiðir við viðurkennandi námsfrøði og KRAP, og starvsfólk hava eina samanhangandi og virðiliga tilgongd til húsfólkini. Arbeiðshættirnir leggja dent á stuðlandi dialog, sjálvhjálp, sosialan felagsskap og dagligar rutinur, og tað sæst, at starvsfólk leggja sær eftir at skapa tryggleika og struktur í dagligdegnum. Eftirlitið vísir, at tilboðið arbeiðir miðvíst við at tryggja, at arbeiðshættirnir eru fakliga grundaðir og lagaðir til tørvir og førleikar hjá húsfólkunum.

**Organisatión og leiðsla**
Tilboðið hevur eina vælskipaða organisatión, har leiðsla og starvsfólk hava greiðar leiklutir og eitt jaligt samstarv. Arbeiðsuppgávur, ábyrgdarbýti og dagligar mannagongdir eru greiðar og skapa ein stabilan og tryggan rakstur. Leiðslan er tøk, stuðlandi og arbeiðir

saman við starvsfólkum um at tryggja fakliga menning og góða tænastu. Heildarmetingin er, at Sambýlið Niðaragøta hevur eina vælvirkandi organisatión, sum tryggjar samanhang og dygd í tænastuni.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til at styrkja samstarvið við avvarðandi munandi við kunning, statusfundum og felagstiltøkum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið fer at halda fund við avvarðandi og avstemma tørvin í mun til kunning, statusfundir og felagstiltøk.

*Mælt verður til, at vaktarskiftið gerst meiri skipað.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Búviðurskiftini gera, at tað ikki altíð letur seg gera, at starvsfólk kunnu fara frá í einum vaktarskifti fyri at geva rapport. Almannaverkið fer saman við starvsfólkunum at umrøða, hvussu vaktarskiftið kann gerast meiri skipað.

*Mælt verður til at hava ein húsfund um vikuna, har matskráin verður løgd fyri komandi vikuna. Kunning verður givin húsfólkunum og onnur møgulig evni verða viðgjørd, afturvið einum kaffimunni.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Øll búfólk og starvsfólk eta saman hvørt kvøld. Tilboðið fer at skipa ein húsfund í framhaldi av máltíðini einaferð um vikuna, har kunning verður givin og matskráin fyri komandivikuna kann leggjast.

*Mælt verður til at húsfólk, ið ikki fara á vardan verkstað, fáa eina dagsskrá.*

**Almannaverkið viðmerkir**

Talan er um tríggjar borgarar, ið ikki hava dagtilboð. Hesir hava allir fastar rutinur í tøttum samstarvi við starvsfólkið. Flestu aktivitetir eru niðurskrivaðir í virkisætlan og kalendaran. Tey luttaka eisini í tí, sum tey hava tørv á, t. d. hava fastar tíðir til fysioterapi og ymiskt, sum tey sjálvi ynskja.

*Mælt verður til at hava árligar statusfundir við avvarðandi, har virkisætlanir vera gjøgnumgingnar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Hetta verður gjørt í tann mun borgarar geva samtykki.

*Mælt verður til, at samsvar er ímillum tað, sum stendur í skjølunum um fakligar arbeiðshættir, og tað, sum starvsfólkini nevna í eftirlitsvitjanini.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Tað er ikki greitt fyri Almannaverkinum hvat sipað verður til, men Almannaverkið fer at hyggja uppá, um ósamsvar er.

*Mælt verður Almannaverkinum til at betra um vitanina, sum starvsfólkini hava um valdsfráboðanir og greiða teimum frá, hvussu skipanin um valdsfráboðanir virkar. Samstundis verður viðmælt, at tilboðið fær svar uppá valdsfráboðanirnar, ið eru skrivaðar – ikki eina og eina, men t.d. einaferð um árið.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið hevur ikki "valdsfráboðanir" og roknað verður tí við, at hetta snýr seg um harðskapsfráboðanir. Skipanin við harðskapsfráboðanum er soleiðis, at starvsfólk við serskildum oyðublaði fráboða til sín leiðara, sum innsendir fráboðanina. Fráboðanin verður svarað við móttøkuváttan frá HTU samskiparanum í Almannaverkinum. Tað er á staðnum, at hendingin verður viðgjørd, og at arbeitt verður við at fyribyrgja harðskap saman við leiðaranum. Einaferð um ári verða allar fráboðanir fyri hvørt stað tiknar upp á fundi við leiðaranum og eindarleiðaranum, saman við starvsfólki frá Stjórnarskrivstovuni, har tosað verður um, hvussu gongur við harðskapinum, og hvat er gjørt fyri at fyribyrgja harðskap.

*Mælt verður til, at felags leistur verður gjørdur til, hvussu skrivast skal í Skjalfest, og til at fáa virkisætlanir og skjalfest at rigga best møguligt saman.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið arbeiðir støðugt við at betra um virkisætlanirnar í Skjalfest. Í hesum førinum verður arbeitt við at deila virkisætlanirnar upp, soleiðis at samanhangurin verður greiðari í mun til tað, sum verður skjalfest.

*Eingin áheitan verður givin.*